SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*- Undir dystinum hugsaði eg ikki so nógv um, at hetta var seinasti dystur hjá mær, men tá eg fór av vøllinum eftir dystin, tá kendist tað eitt sindur løgið.*

*Lassin Isaksen, fótbóltsdómari*

# Lassin sløkti á Landsdowne Road

**- Hetta var ein fantastiskur endi, sigur Lassin Isaksen, sum mikukøldið dømdi sín seinasta altjóða dyst. Lassin hevði samstundis seinasta bríkslið á 134 ára gamla leikvøllinum Landsdowne Road, sum nú fer í søguna**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*



*- Hetta var eitt upplivilsi fyri lívið, og nú hetta skuldi hava eina enda, so kundi tað ikki verið betur, sigur Lassin Isaksen um sín seinasta dyst sum dómari í altjóða fótbólti*

Mikukvøldið segði Lassin Isaksen farvæl til sína drúgvu uppgávu sum fótbóltsdómari. Lassin dømdi í farna mánaði sín seinasta dyst í føroysku landskappingini, og mikukvøldið takkaði hann fyri seg í altjóða fótbólti.

Tað gjørdi hann á Landsdowne Road í Dublin, har írska landsliðið spældi sín seinasta landsdyst. Dysturin var ímóti San Marino, og Írland vann 5-0. Robbie Keane úr Tottenham skoraði trý av málunum.

- Hetta var ein fantastiskur endi at fáa. Stemningurin var sera góður millum teir 34.000 áskoðararnar, og tað gekk væl at døma. Spælararnir vóru léttir at fáast við, og eingin brúkti seg um nakað, sigur Lassin Isaksen.

Uppgávan var ikki tann torførasta, men Lassin loysti hana væl, og føroyski dómarabólkurin fekk góð skoðsmál frá eygleiðarunum.

### Ikki so strævið

Tað var eisini markerað á Landsdowne Road, at hetta var seinasti dysturin hjá Lassin Isaksen.

- Teir nevndu tað í hátalarunum í hálvleikinum, og eg fekk eisini púra óvæntað onkra gávu eftir dystin. Undir dystinum hugsaði eg ikki so nógv um, at hetta var seinasti dystur hjá mær, men tá eg fór av vøllinum eftir dystin, tá kendist tað eitt sindur løgið, sigur Lassin.

- Dysturin gjørdist ikki so strævin, sum onkrir aðrir dystir hava verið. Eg havi teljara á, so eg veit, hvussu nógv eg renni undir einum dysti, og eg rann rímiliga nógv. Men Írland hevði so nógv spæl, at dysturin var ikki um allan vøllin - tað mesta gekk fyri seg á aðrari helvtini.

### Gott skoðsmál

Tveir eygleiðarar fylgdu við avrikinum hjá føroyska dómarabólkinum, sum umfram Lassin Isaksen eisini var mannaður við Jón Kára í Brekkuni, Jens Albert Simonsen og Petur Reinert.

- Eg haldi, at eg kann siga, at vit fingu sera gott skoðsmál eftir dystin, og tað eri eg eisini fegin um. Annar av eygleiðarunum var tann sami, sum eg hevði til mín fyrsta altjóða dyst, sigur Lassin.

- Hetta var eitt upplivilsi fyri lívið, og nú hetta skuldi hava eina enda, so kundi tað ikki verið betur, sigur hann.

### Stjørnurnar órógvaðu ikki

Millum spælararnar á írska landsliðnum eru stjørnur, sum fólk kenna væl frá Premier League, men hetta nervaði ikki avrikið hjá Lassin.

- Eg hugsaði als ikki um hetta undir dystinum. Eg dømdi dystin sum allar aðrar dystir, men aftaná kann eg saktans staðfesta, at á dómaraseðlinum vóru nógv kend nøvn, sigur Lassin.

- Írsku spælararnir vóru góðir at fáast við, og teir vístu fair-play ímóti liðnum hjá San Marino.

Ferðin hjá føroysku dómarunum til Írlands eydnaðist sera væl. Teir fingu sera góða viðferð frá sínum írsku gestum, og so fingu teir eisini høvi at heilsa upp á ein gamlan kenning - fyrrverandi Premier League-dómaran Dermot Gallagher, sum áður hevur verið í Føroyum og dømt.

## Billard-toppurin dystast í Klaksvík

BILLARD
*Tíðindaskriv*

Sum vanligur siður hevur verið í mong ár, so byrjar billardárið við Haldor Holm kappingini í Klaksvík, har fimm teir bestu spælararnir í landinum bresta saman. Hesir eru: Hendrik Petersen, Krisjan Suni Høgnesen, Karsten Hansen, Sonhard Johannessen og Jan Müller. Hetta er 16 árið at kappast verður um Haldor Holm steypið. Fyrstu ferð var í 1989, tá Jan Müller megnaði at fáa sítt navn í stóra og vakra steypið, sum Billardsamband Føroya lat Klaksvíkar Klubba at kappast um og hava í varðveitslu. Endamálið við kappingini var at heiðra tað arbeiði, sum Haldor Holm hevði gjørt fyri billardspælið í Føroyum. Kappingin skuldi vera byrjanin uppá billardárið, og í kappingini skuldu vera 5 av landsins bestu spælarum.

Kappingin verður spæld í Klaksvíkar Klubba fríggjadagin og leygardagin. Byrjað verður fríggjadagin kl. 16, tá Sonhard Johannessen og Jan Müller fara til borðið. Føroya Bjór hevur verið sponsor til kappingina á hvørjum ári.

Føroyameistarakappingin er nakað seinkað í ár men farið verður í gongd síðst í november ella fyrst í desember. Kappast verður helst í A og B bólkinum.